# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Bendt Jensen, fyrrverandi yvirlækni, deyður

Leygarmorgunin 9. december andaðist Bendt Jensen, fyrrverandi yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, 85 ára gamal.



Bendt Jensen var yvirlækni á Medisinskari deild á Landssjúkrahúsinum frá 1960 til 1973. Bendt varð føddur og uppvaksin í Odense og kom til Føroya at virka sum lækni á fyrsta sinni í 1959. Frammanundan hevði hann arbeitt á ymsum sjúkrahúsum í Danmark og Norðursvøríki.

Bendt Jensen var fyrsti yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, ið varð settur aftrat Paula Dahl, og hann átti eisini sín part í, at tað nýggja Landssjúkrahúsið stóð liðugt í 1967. Bendt Jensen bar orð fyri at vera ein sera dugnaligur og nærlagdur lækni og var væl kendur í læknaverðini fyri sínar medisinsku ritgerðir. Kundi fyri tað verið blivin doktari fleiri ferðir, men tað hevði slettis ikki hansara áhuga.

Bendt Jensen mundi eisini vera ein tann fyrsti danskari, ið gjørdist limur í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag, nakað sum kanska ikki var so vanligt tá á døgum.

Í teirri lítlu Havnini, sum tá varð, gjørdust læknahjúnini Uppi undir Varða ein býarmynd. Tey fullu sera væl til í Føroyum, men valdu kortini at flyta aftur til Danmarkar í 1973. Í mong ár høvdu hjúnini privatklinikk í Roskilde, og eftir at Bendt Jensen fór frá við eftirløn, hava tey búð á Frederiksberg.

Bendt Jensen gloymdi ongantíð tíðina í Føroyum og var føroyavinur um ein háls (hetta skal skiljast positivt). Hann var sera góður við Føroyar, og íbúðin á Frederiksberg var sum eitt gallarí við føroyskari list. Bendt Jensen fylgdi væl við í føroyskum viðurskiftum og hevði framvegis, eftir so mong ár, nógvar góðar vinir bæði í Føroyum og ímillum føroyskar útisetar. Tað var so mangan at gamlar sjúkrasystrar og onnur lótu heilsa, og mangir føroyingar, útisetar eins væl og fólk í danmarkarørindum, hava sitið væl inni hjá læknahjúnunum. Heimføðingar høvdu kallað hetta føroyskt gestablídni, tá ið tað er best.

Harumframt eru vit nøkur, ið stóðu honum sera nær, og sum hava læknahjúnunum ómetaliga nógv fyri at takka.

Hesi seinastu árini var Bendt Jensen merktur av sjúku, men hansara tiltikna treiskni, ið bókstaviliga bjargaði honum á barnaárum, og sum førdi hann so langt á leið, helt eisini lívið í honum nú í seinastuni, tá ið likamið orkaði alt minni.

Bendt Jensen fer til gravar úr Godthåbskirken, Nylandsvej 51 á Frederiksberg, Leygardagin 16. desembur klokkan 14.

**Heri Eysturlíð**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Elaina Vilhelm, Leirvík, fyrr búsitandi í Vági**, andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, mánadagin 11. desember, 90 ára gomul. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík hósdagin 14. desember kl. 18. Jarðarferðin verður úr Hebron í Leirvík fríggjadagin 15. desember klokkan 13.

**Bendt Jensen, fyrrverandi yvirlækni á Landssjúkrahúsinum**, andaðist leygarmorgunin 9. desember, 85 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Godthåbskirken, Nylandsvej 51 á Frederiksberg, leygardagin 16. des. kl. 14.

Kistan við **Bjarna í Sjúrðagarði**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum hóskvøldið kl. 18 heim í Vesturkirkjuna. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni til Kaldbaks fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Bjarna, kunnu lata eina gávu til Føroya Felag Móti Krabbameini.

Kistan við **Anni Højgaard**, dóttir Hjørdis og Arna Højgaard, **Toftir**, kemur við flogfarinum mikukvøldið kl. 20.15. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni hósdagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Anni, kunnu lata Føroya Felag móti Krabbameini eina gávu.

†

Mit et og alt

Overlæge
**Bendt Jensen**

10. mars 1921 - 10. des. 2006.

**Hanne Kramer Jensen,
familie og venner**

Bisættelsen fra Godthaababskirken, Nyelandsvej 51, Frederiksberg lørdag den 16. des. 2006 kl. 14.00

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, ið mintust meg á 80 ára degi mínum 25. okt. 2006. Takk fyri uppringingar og takk til øll, ið stukku inn á gólvið og gjørdu mær dagin so hugnaligan.

**Kristina Thorsteinsson, Klaksvík**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Jensia Olsen**
Skálavík

andaðist og varð jarðað.
Takk fyri alla ta hjálp, sum veitt var okkum í sambandi við jarðarferðina.
Takk fyri góð orð í kirkju og kapelli.
Ein serstøk tøkk til Ellisheimið í Skálavík.
Takk fyri blómur og kransar, og til tey mongu, sum fylgdu Jensiu til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jón, Elinborg, Sæbjørn og Jørmund**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæra mostir

**Elaina Vilhelm**

Leirvík
fyrr búsitandi í Vági

andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi mánadagin 11. des. 90 ára gomul.

Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík hósdagin 14. des. kl. 18.

Jarðarferðin verður úr Hebron í Leirvík fríggjadagin 15. des. kl. 13.

**Borghild, Óli og Høgni**

**Dagurin í morgin**

**14. desember. Crispus.** Óvist er hvønn navnið sipar til, kanska biskupin Crispina, sum varð tikin av døgum umleið ár 300.

## Rætting:

Í minningarorðunum um Bjarna í Sjúrðagarði kom eitt navn skeivt fyri. Navnið á vermóðir hansara er ikki Inga, men Greta Ellingsgaard. Orsakið mistakið.

